# Ver mín vongur

- Hey Bára!

Eg hvøkki við. Eg hómi tað reyða innan eygnalokunum, tá heita sólin skínir í andlit mítt.

- Bára? Ert tú sovnað?

Tað er Sanna. Eg lati eyguni upp og síggi hana standa frammanfyri mær.

- Bára for ólukkan! Tú kanst ikki bara leggja teg, bara eg líka fari út at fáa mær ein guv, tín tapari!, sigur hon.
- Gev mær frið at hava timburmenn for ólukkan, Sanna!
- Nei hon sjálv! Nú fara vit at reisa okkum, og so fara vit út at ganga ein túr, eins og vit ætlaðu okkum í fyrstu førum! sigur hon og togar í arm mín.

Eg seti meg upp, og strekki meg. Eg andi inn gjøgnum nøsina og haldi ondini. Eg merki, hvussu allir musklarnir í kroppinum dansa og eg hoyri deiliga brakið frá innanliðunum í ørmunum.

- Ahh, eg andi út gjøgnum munnin, og reisist.

Sólin bakar á skalla mín. Eg hoyri vælkenda bleyta murrið frá mýrisnýpunum og kenni váta angan av nýsliðnum bøi.

- Nú fer sikkurt at regna, sigur Sanna brádliga, og hyggur upp í klára, bláa himmalhválvið.
- Regn? spyrji eg undrandi, og hyggi eisini upp at himmalinum.
- Ja. Tá ið mýrisnípurnar fara at murra, verður toka ella vátt veður, tað sigur man.

Hon hyggur at mær. Eg brosi og hyggi burt.

- Nólsoyggin er so deilig um várið. Sólin skínur, og øll í bygdini eru so glað. Sikkurt pá grund av øllum teimum góðu d-vitaminunum," sigur hon smílandi.

Vit eru komnar út á endan á Stongini, og vit steðga. Eg seti meg niður í turra grasið, og blundi. Brúsandi ljóðið frá aldunum niðanfyri ljómar blítt í baksýninum, og hitin frá sólini og fríska lotinum kelar okkum eftir beru ørmum okkara. Eg leggi meg niður og andi djúpt.

- Omg hetta er lekkurt!" rópar Sanna. Hví er Føroyar so ótrúliga bipolart also! Tað gevur ongan meining! Ein dag ger tað sítt ýtasta at vera so deiligt sum gjørligt, við sól og summar, og so er brádliga regn og vátaslettingur!

Eg flenni.

- Ja, that's føroyar right there!

Hon hyggur at mær og smílist.

- Góða kann eg ikki taka eina mynd av tær? Hetta er prima materiali til insta!, sigur hon og tekur sína rosagull iphone fram úr lummanum.

- Góða ikki! Eg líkist lort! Onga sminku og timburmenn eru ikki akkurát instaworthy! sigi eg.
- Ej lat vera! Eg kann bara taka eina mynd, har tú vendir rygg til og so tagga teg. Smekka nøkur lekkur filtur á, nøkur neis hashtags og so koyra vit!, sigur hon skemtandi.
- Okay meðni... sigi eg, og lati hana fara aftur um meg. "Klikk! Klikk! Klikk!" ljóðar frá myndatólinum.
- Jaja, tú noyðist ikki at taka eitt heilt album allíkavæl, sigi eg og reisi meg.
- Tú ert bara so lekkur! Eg fái ikki nokk! Strike a pose baby! sigur hon og skapar sær.

Vit báðar flenna, og seti meg aftur. Hon setir seg undir liðini á mær, og vit líta út á stóra bláa sjónarringin.

- Tað er leygardagur, sigur Sanna.
- Ja? svari eg.

Hon hyggur at mær og brosar

- Skulu vit ikki fara til Havnar at ballast í kvøld? spyr hon.

Eitt lætt og spent bros fer strúkandi um kinn hennara.

- Umaftur í kvøld? Tveir dagar av ball aftaná hvønn annan? sigi eg.
- Ja man! Tað í gjárskvøldið telur ikki við! Ball í Nólsoy eru for tame. Tað er í Havn tað sker!, sigur hon og hyggur spent at mær.

Eg hyggi at henni.

- Meinar tú tað?
- Ja kom! Ternan fer um 3 korter. Veðrið er genialt!

Vit sita í ternuni. Eg hoyri skróvið av kaffibønum, ið verða maldar til ein heitan kaffimunn, onkur hevur keypt sær fyri 15 krónur. Heita mjólkin skúmar úr maskinuni niður í svarta kaffið, og beiski deymurin av koffeini røkkur nasagluggarnar við boðum um hugna.

- Kom út. Mær tørvar ein guv, sigur Sanna og reisir seg.

Eg fari aftaná henni. Úti skínur heita sólin, og fríska lotið kínir okkum um kinn. Hár Sonnu flákrar blítt meðan hon lenar seg framyvir rimagirðingini blundandi.

- Nú Bára? Gleðir tú teg ikki?" sigur hon, enn blundandi.
- Til ball?
- Ja? sigur hon.
- Jú, I guess, sigi eg við heldur minni øsing í røddini.
- Man har ikki vera onkur fittur havnadrongur til tín? Ella kanska ein lekkur argjafrensur, spyr hon argandi og hyggur at mær.
- Til mín?! Ei nú tvætlar tú. Eingin, drongur vil hava eina sovorðna sum meg.

- Eina sovorðna sum teg?! Ikki tvætla býtt! Tú ert lekkur! Eg lovi tað, eg skal nokk finna tær ein fittan í býnum. Leggi einki í, hvat tú sigur, sigur hon treisk og lítur út á havið.

Eg sigi einki.

- Kom skunda tær! rópar Sanna og rennur av skipinum. Vit skulu niðan til Rósu at gera okkum klárar áðrenn ballið. Hon ætlar, at vit skulu vera úti áðrenn kl 20.

Komnar niðan til Rósu sita vit og gera okkum klárar. Harður nýmótans tónleikur rungar úr bíligu hátalarunum hjá Rósu, og roykurin ger lítla kamar hennara kámt.

- Hvat heldur tú um hesa? spyr Rósa Sonnu og vísir henni bjart reyðu varrar sínar.
- Hon er lekkur! Er hon MAC ella hvat?
- Ja, eg keypti hana seinast eg var niðri, svarar Rósa og hyggur aftur inn í spegilin. Hon er

sjúkliga neis. Heldur tú ikki Bára? spyr Sanna og hyggur yvir at mær.

- Jú, hon er lekkur, svari eg.
- Vilt tú læna hana? spyr Rósa, og kastar mær varrastiftina.
- Ja, royn hana Bára, tú klæðir so væl reytt, tekur Sanna undir.

Eg reisi meg og fari tættari spegilinum. Komin heilt nær smyrji eg reyðu varrastiftina blídliga og varliga á varrarnar. Bleyta varrastiftin gevur óglæra farið av heita litinum eftir sær. Eg eri eyka varin, at ikki smyrja útum linjurnar. Klæði væl reytt? Reytt skal sigast at vera kærleiksins litur.. ja, hvør veit? hugsi eg við mær sjálvari.

Deymurin av royki ert ikki sørt minni í ballinum. Fólk sita allastaðnis og práta og ballingartónleikurin rungar úr stóru hátalarunum.

- Halló! Vælkomnar.

Ein drongur kemur yvir til okkum, helst verturin av ballinum, við eini glasfløsku av havi og einum 4cl glasi í hondini.

- Durasnaps? spyr hann og byrjar at skeinkja í glasið, eins og høvdu vit einki val høvdu.
- Ajaa, jú takk meni, letur úr Sannu, meðan hon tekur ímóti snapsinum.
- Skál! rópar hon, og tekur hann í einum.
- Hon sjálv! sigur verturin og skeinkir glasið uppaftur og rættir Rósu.

Eftir at vit hava tikið eina øl í part, sessast vit við stovuborðið. Fleiri fólk sita longu og práta og flenna hart.

- Hey tit! Hvat sker her? spyr Rósa.
- Vit spæla sp ella k. Eru tit við?”
- Ja kom! Tað ljóðar festligt!” svarar Sanna.
- Okay, eg byrji við tær, Óli, sigur Rósa. “Sp ella k?”

- "K" svarar Óli.
- Alright, so sigi eg at tú skalt... taka ein snaps!...
- Ei, óoriginalt Rósa! rópa øll sum í kór.
- Okay meni, slappið av! sigur Rósa.
- ...Av chillisós! rópar hon, og øll flenna.
- Seriøst? sigur Óli og heldur sær upp fyri andlitið. Ein reisir seg og fer út í køkin eftir chillisósini.

Skonkt verður upp, og Óli verður rættur glasið.

- Náh, men skál tit! sigur hann og rættir upp glasið. Reyða sevjan fer rennandi niður í hálsin á Óla, og hann fer sum eitt strok út á vesi, alt meðan fólkið sita eins og hýenur í látri.
- Náh, koyra vit víðari?" brýtur ein láturin av.

Spælið koyrir og vit drekka, drekka og drekka meir. Eg byrji at leggja minni og minni í roykin í rúminum og øll í rúminum blíva so við og við minni fremmand, hóast eg enn ikki havi skift orð við tey. Sanna og Rósa eru eisini fullar, tær roksa øgiligt, og taka nógvar avbjóðingar í spælinum og siga frá nógvum loynidómum, ið tær fara at angra at hava sagt í morgin. Eg siti í hálvum tankum við eini øl í hondini. Hon er vorðin dovin. Brádliga

- Eg velji teg, Bára! Tað er Rósa.
- Sp ella K?
- Øhm... K? sigi eg uttan at ordiligt geva mær far um hvat tað er, eg sigi.
- Okay, hetta verður stuttligt! sigur Sanna og hyggur at mær.
- Tú skalt... mussa Óla! sigur Rósa og øll flenna.
- Ha? Nei, øhm, eg meinti s! sigi eg ørkymlað og brosi.
- Nei hon sjálv, tað kanst tú ikki! sigur Rósa.

Øll taka undir við henni. Eg hyggi skelkað rundanum meg.

- Nei, eg veit ikki ordiliga..
- Torir tú ikki? sigur onkur.
- Ongantíð mussað nakran fyrr? sigur ein annar. Ert tú kanska lebbi ella okkurt?

Eg hvøkki við. Eg hyggi rundanum meg. Alt er stilt brádliga.

- Nei tvætla, ikki pressa hana um hon ikki vil! tað er Sanna.

Eg hyggi at henni. Eg merki tárini royna pressa sín veg fram í eygnakrókarnar, men eg hyggi burt.

- Nåh, so spyrji eg meni teg, Óli, sigur Rósa.
- Meg umaftur? letur í honum.

Ballið gongur sína leið, og fólkið drekkur og tónleikurin leikar í. Eg siti í sofuni. Her eru trý onnur, ein sær út at vera avdottin. Ein onnur øl er í hondini á mær, nú eisini vorðin dovin. Eg

siti og hálvsovi. Hugsi um at fara at spyrja Sannu, hvat hon ætlar sær næst. Eg havi drukkið ov nógv. Eg kenni longu timburmennirnar, ið eru fyri framman. Eg blundi ein løtu. Brádliga merki eg onkran undir liðini á mær. Tað er Óli.

- Hey Bára. Situr tú her einsamøll og svevur? spyr hann við speisemi í røddini.
- Nei tú, eg mátti bara líka blunda haha..., svari eg aftur og flenni eitt sindur.
- Hon sjálv sær í øllum førum út til at hugna sær. Ikki sum tú haha. Sigur hann og peikar inn á gólvið, har fólk dansa.

Eg síggi Sannu. Ikki bert Sannu. Verturin er har eisini. Hann heldur hana um miðju hennara. Hon um nakkan á honum. Tey hyggja at hvørjum øðrum... Og eg at teimum. Brádliga merkist tað eins og ein steinur søkkur í búkinum á mær. Ein stórur, tungur steinur.

- Eg skal fara eftir einari øl til tín, fáa eitt sindur lív í teg aftur, sigur Óli og reisist.

Eg siti eftir. Hvat er hetta. Hendan kenslan. Hesin steinur. Alt stendur í stað.
Óli er afturkomin.

- Har var eingin øl eftir, men eg fann hesa, sigur hann og rættir upp eina hálva eldvatn. Hann bjóðar mær uppí eitt glas og eg takki. Niðurum fer tað. Í einum.

Steinurin lætnar. Eitt afturat. Niðurum. Hann lætnar. Og eitt afturat.. og....

- Bára? ... Bára vakna. ... Ternan fer um hálvan tíma.

Eg rakni við. Tað er Rósa.

- Hmm? mutli eg.
- Skalt tú ikki til Nólsoyar aftur? spyr hon.
- Hvar eri eg?
- Tú ert heima hjá mær, svarar hon.
- Hvar er Sanna? spyrji eg.
- Eg haldi hon fór við Ternuni í morgun. Hann sjálvur fylgdi henni.

Hann sjálvur... tað passar.

- Ja, eg komi upp nú, sigi eg tungt.

Eg siti í Ternuni. Eg hoyri vælkenda skróvið frá kaffimaskinuni umborð, men kennist ikki við tað; ikki á sama hátt. Steinurin í búkinum er tungur. Tyngri enn í gjárskvøldið. Hvat er hendan kenslan? Hví skal hon pína meg?

Heimkomin blaki eg meg í songina. Kanska havi eg bara moralskar, hugsi eg við mær sjálvari. Nei, eg kenni hesa pínuna. Eg reisi meg og fari yvir til spegilin. Restir av doyvdum reyðum sæst á varrunum. Reytt. Ha! Kærleiksins litur. Har eru eisini aðrir boðskapir við hesum litinum, ið eg ikki gav mær far um...

Eg fari undir brús. Heita vatnið skolar tað versta av timburmonnunum niður í frárenslið. Útafturkomin sessist eg við skriviborðið. Steinurin er tungur sum áður. Følist eins og búkurin er um at skrædna. Eg suffi, taki blýantin í hondina, og skrivi...



Til tín.

Eg veit, tú einki veitst. Og eg veit, at eg ikki kann geva tær skyldina fyri nakað, tí at tú kennir ikki mína støðu. Hóast tað, kenni eg hesa vælkendu kensluna í maganum. Hendan tunga, pínandi, søkkjandi kenslan. Eg kenni hana eisini frá fyrr av. Frá øðrum persónum, men eg hevði ikki vantað mær at hon skuldi uppstanda frá tær. Eg eri góð við teg. For góð við teg. Og tú veitst einki. Eg eri skuffað. Men eg dugi ikki at siga av hvørjum. Eg eri skuffað av mær sjálvari, av tær, av okkum. Eg ræðist hesir myrku tankar í høvdi mínum. Eg eri farin av leið, inn í tokuna, einsamøll, og eg veit ikki hvussu eg skal finna fótafesti aftur. Tú veitst av ongum. Hví veitst tú av ongum? Tú ert klókasti  og eyðmjúkasti persónur eg kenni. Eg kenni teg. Hví kennir tú ikki meg? Vit hava verið so nógv saman í seinastuni, og eg havi følt gleði rísa upp inni í sinni mínum, men tú veitst av ongum. Tú heldur, at vit eru eins og vit altíð hava verið, men eg veit øðrvísi. Eg vil at tú skalt vita. Men eg vil ikki oyðileggja tað, ið vit hava, hóast tað, ið vit hava, er uppbygd av einsrættaðum kenslum. Eg vil so gjarnað fortelja tær alt, men...

…Nei… Hetta nyttar ikki…

- Hey Bára!
- Eg líti yvir, og síggi glaða eygnabráið og frísuta hárið.
- Nú? Hvat hendi í gjár, spyr Sanna. Tú vart heilt vekk, haha!, flennir hon.
- Ja, fekk nokk eitt sindur ov nógv niðurum. svari eg.

Vit fara til gongu. Tað er turt. Blíðu skýggini sigla stillisliga tvørturum himmalhválvið, og lotið hevur við sær kulda frá eystan. Vit ganga í stilli.

"Klipp!" eg hyggi upp.

- Eitt tjaldur, sigur Sanna.
- Ja, grækarismessan er beint við hondum, sigi eg.

Vit seta okkum. Eg líti út á havið. Eg síggi sjófuglarnar leika í. Fara eftir høvdinum niður í sjógvin, og síðani eftir eina løtu koma undan kavi aftur.

- Hví kunnu vit ikki flúgva? letur brádliga í Sonnu.
- Hvat?
- Um eg hevði kunnað flogið, hevði eg farið langt burtur. Sloppið undan øllum. Bert flogið, sigur hon.
- Ja, tað krevst veingir at flúgva. sigi eg so dánt.
- Kanst tú ikki tað?
- Kann eg ikki hvat? spyrji eg.
- Kanst tú ikki vera mín vongur?